UTTAN ÚR HEIMI

## Mærsk økir virksemið

Oljufelagið hjá stóru donsku fyritøkuni A.P.Møller, Mærsk Olie & Gas, hevur sett sær fyri at økja sítt virksemi.

Mærsk Olie & Gas seldi í fjør olju og gass fyri góðar 20 milliardir krónur, og avlopið var 5,6 milliardir krónur. Tað mesta stavar frá oljuleiðunum í Norðsjónum, men felagið fer nú at leggja størri dent á aðrar leiðir, sigur fíggjarstjórin, Eivind Kolding, við Politiken. Mærsk Olie 6 Gas er virkið í Qatar og Kasakhstan, og í Algeria arbeiðir felagið saman við tí amerikanska Andarenko. Eivind Kolding sigur, at felagið fer møguliga at yvirtaka nýggjar leiðir ella at keypa seg inn í verandi leiðir.

Roknskapurin hjá Mærsk Olie & Gas vísir annars, at felagið hevur ikki fingið serliga nógv burtur úr tí góða oljuprísinum. Umsetningurin í fjør var bara eina milliard krónur størri enn í 2003, og vinningurin í fjør var tann sami sum árið fyri. Sambært donskum serfrøðingum kemst tað av, at danska felagið nýtir langtíðarsáttmálar og fær tí ikki fullan ágóða av hækkandi oljuprísinum.

## Fimti hvør svii arbeiðsleysur

Fakligi landsfelagsskapurin í Svøríki vil vera við, at arbeiðsloysið er munandi størri, enn tey almennu hagtølini vísa.

Sambært teimum almennu hagtølunum er svenska arbeiðsloysið 5,5 prosent, men fakligi landsfelagsskapurin heldur, at tað rætta talið er einastaðni ímillum 20 og 25 prosent. Tá eru tey, sum eru arbeiðsfør, men sum fáa sjúkrapengar ella pensjón, tald við, og tey skulu teljast uppí, sigur Hans Karlsson í vinnunevndini hjá landsfelagsskapinum við blaðið Dagens Industri. Sjálvur heldur hann, at nógv frísk fólk verða sjúkrameldað, tí tey hava einki arbeiði, og tað er heilt burturvið, sigur hann og legur afturat, at í dag er skipanin soleiðis háttað, at fólk fáa pengar, aftur fyri at tey skulu ikki arbeiða.

Hans Karlsson, sum hevur sitið í Ríkisdegnum og ES-tinginum, heldur, at stjórnin ger alt ov lítið fyri at loysa trupulleikarnar við teimum arbeiðsføru, sum ikki arbeiða. Men hetta kann ikki halda fram, tí svenski búskapurin tolir tað ikki, sigur hann.

## Burtur úr vón og viti

Ein nevnd, sum George W. Bush, forseti, setti at kanna arbeiðið hjá teimum amerikonsku fregnartænastunum undan kríggnum í Irak, sigur í sínari frágreiðing, at arbeiðið hjá CIA og hinum fregnartænastunum var stutt sagt burtur úr vón og viti.

Nevndin sigur millum annað, at alt ov nógvar niðurstøður um viðurskiftini í Irak bygdu á gitingar og metingar heldur enn haldgóð prógv. Eisini sigur nevndin, at upplýsingarnar um ta iraksku vápnamegina vóru alt ov veikar, og at fregnartænasturnar gjørdu alt ov lítið við at savna veruligar upplýsingar um tað evnið.

Kanningarnevndin ger samstundis vart við, at okkurt má gerast, tí tað veika fregnartænastuarbeiðið ger, at amerikanararnir vita lítið um sínar vandafullu fíggindar. Nevndin sigur beint fram, at USA veit skelkandi lítið um vápnamegina hjá sínum fíggindum og uppaftur minni um teirra ætlanir.

## Pólferð varð av ongum

Norska Liv Arnesen og amerikanska Ann Bancroft, sum ætlaðu sær til Norðpólin, noyddust fyrrakvøldið at venda aftur.

Tær báðar fóru úr Norðurrusslandi fyri nøkrum døgum síðani við kós ímóti Norðpólinum. Avtalað var, at franska felagið Cerpolex skuldi flúgva útgerð norður til teirra við tyrlu, og franska felagið fekk eitt russiskt felag at gera arbeiðið fyri seg. Men tað vísti seg, at tað russiska felagið var ikki ført fyri at halda avtaluna, og tí máttu tær báðar venda aftur. Tær vóru tá komnar noður á 83 stig.

Sambært Aftenposten høvdu Liv Arnesen og Ann Bancroft brúkt tvey ár til at fyrireika ferðina til Norðpólin. Tær eru tí sera vónbrotnar, skrivar blaðið.

# Pávin á deyðastráð

**Jóhannes Páll pávi Annar livir sera illa, og í Rom eru fólk farin at gita, hvør eftirmaður hansara verður**

PÁVIN

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Fyrrakvøldið kunngjørdi Vatikanið í Rom, at Jóhannes Páll pávi hevði fingið ta seinastu oljuna, tí hann livdi sera illa. Pávin hevur drigist við lungnabruna i seinastuni, men sambært læknunum hevur hann nú eisini fingið bruna í landrásina. Í gjár ljóðaði, at hann var batnaður nakað, men læknarnir gjørdu samstundis greitt, at tað næsta samdøgrið fór at verða hættisligt.

Leiðslan í Vatikaninum hevði ikki nakrar beinleiðis viðmerkingar til heilsustøðuna hjá pávanum, men ein eysturríkskur kardinalur segði við tíðindastovurnar, at pávin var so nær deyðanum, sum hugsast kann.

Tann langa sjúkralegan hjá pávanum hevur reist spurningin, hvør skal taka við eftir hann. Tá Jóhannes Páll pávi Annar, sum tá æt Karol Wojtyla, bleiv valdur í 1978, var hann tann fyrsti pávin í 455 ár, sum ikki var italiumaður. Nú er so spurningurin, um tað aftur verður ein italiumaður ella onkur annar evropeari, ella um tann næsti pávin verður úr onkrum øðrum heimsparti.

Bretska blaðið The Guardian vildi í gjár vera við, at fýra kardinalar tykjast hava teir bestu møguleikarnar. Ein teirra er tann 77 ára gamli týskarin Joseph Ratzinger, ið verður hildin at hava staðið pávanum sera nær tey seinastu tjúgu árini. Hann er eisini væl umtóktur og sigst hava somu grundsjónarmið sum Jóhannes Páll pávi Annar.

Hinir tríggir, sum verða nevndir, eru pólendingurin Stanislav Dziwisz, sum hevur verið persónligur skrivari hjá pávanum, italiumaðurin Angelo Sodano, sum er umsitingarleiðari í Vatikaninum, og spaniumaðurin Juan Herranz Casado úr tí mátmikla felagsskapinum Opus Dei.



*Jóhannes Páll pávi Annar hevur sitið í pávastólinum í 27 ár. Bara tveir pávar hava røkt embætið longri enn hann*

# Vánaligur sjómansskapur kostar tryggingunum nógv

**Umleið helmingurin av øllum óhappum og vanlukkum á sjónum standast av vánaligum sjómansskapi, men vánalig skip eru eisini ein orsøk**

SIGLING

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Mistøk á brúnni umborð á skipum kostaðu í 2003 teimum norsku tryggingarfeløgunum umleið 2,5 milliardir krónur. Í flestu førum snúði tað seg um, at skip stoyttu saman ella fóru á land.

Stjórin í felagsskapinum hjá teimum norsku sjótryggingarfeløgunum, Tore Forsmo, sigur við Aftenposten, at í fleiri førum eru manningarnar ikki førar fyri at røkja sína uppgávu, og harafturat eru nógv skip í vánaligum standi. Trupulleikin við vánaligum skipum er størri í teimum góðu tíðunum sum júst nú, tí tá ræður um at fáa sum mest burturúr, sigur han.

Sum er hava tey einstøku tryggingarfeløgini tagnarskyldu, men nú hava tey norsku feløgini søkt myndugleikarnar um loyvi at lata hvør øðrum upplýsingar um reiðarí, sum ikki røkja síni skip. Ein altjóða frágreiðing hevur eisini skotið upp, at tryggingarfeløg kring heimin skulu lata slíkar upplýsingar, og at tey eiga at skráseta vánalig skip í einari serligari skráseting. Endamálið við hesum er at forða fyri, at vánalig skip yvirhøvur verða tryggjað.



*Tað 26 ára gamla tangaskipið "Prestige" fór av um tvøran úti fyri sponsku strondini í november í 2002. Skipið var í alt ov vánaligum standi*